miðvikan
Nr. 196 • 14. oktober 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Ferðin við Norrønu til Íslands:**

# Bakkafjørður er partur av føroysku fólkasálini

**Ikki sær Bakkafjørður nógv út fyri verðini. Hetta er ein lítil og minkandi bygd við færri enn 100 íbúgvum norðuri við Langanes. Men ikki tess minni er Bakkafjørður ein partur av samleikanum hjá nógvum føroyingum**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Sum umrøtt í Sosialinum og Rás 2 skipaði Smyril Line síðst í september fyri eini ferð í fótasporunum hjá føroyskum fiskimonnum í Íslandi.

Spurdur um uppskot til skrá var Bakkafjørður eitt upplagt hugskot við teirri tíð, sum var tøk í Íslandi.

Tað gingu bert fáir dagar, til túrurin var fullteknaður, og skjótt var nóg mikið av ferðafólki til tveir bussar.

Nógv av hesum vóru við, tí teirra pápar og abbar høvdu róð út á Bakkafjørðinum, og tey høvdu ofta hoyrt hesar greitt frá um hetta stað.

Nú høvdu tey so møguleikan at síggja Bakkafjørðin, sum hevði fylt so nógv í teirra lívi.

Í bussunum varð so greitt frá søguni hjá teimum, sum róðu út her, og skal sumt av tí takast fram í hesi grein.

## Útróður til lands

Útróður til lands á Eysturlandinum í Íslandi byrjaði eins tíðliga, sum okkara skipsfiskiskapur í 1870-unum. Sambært bókina Til Lands hjá Sámal Johansen byrjaðu føroyingar í 1871 at dríva útróður við bátum frá skipum inni á íslendsku fjarðunum. Hetta var illa dámt av íslendingum, sum klagaðu til Altingið um hesa "ránsveiðuna" hjá føroyingum. Seinni fóru føroyingar at fáa sær fastar støðir á landi, og tá vóru stórt sæð eingir trupulleikar.

Teir vóru í nógvum støðum. Kend nøvn eru Skálar, Borgarfjørður, Vopnafjørður norðanfyri Seyðisfjørðin, har tað eisini vóru fleiri útróðrarpláss. Sunnanfyri er millum annað Vættarnes, har serliga lorvíkingar vóru. Teir vóru upp til fleiri hundrað í teimum ymisku plássunum.

## Yvir á Bakkafjørðin

Jógvan Edvard Hansen, ættaður úr Fuglafirði, fór í 1932 upp á Bakkafjørðin at rógva út saman við pápanum Hans Jakku á Brúnni, sum róði út á Bakkafjørðinum í meira enn 50 ár. Her vóru eisini t.d. gøtumenn, lambamenn og vágamenn.

Teir høvdu tá maskinbát við. Men ikki var maskinorkan tann heilt stóra, einans 2 hk Wichmann. Fuglfirðingarnir fóru vanliga yvir við Kyrjasteini hjá Jákupi Haraldsen, tá hetta skip kortini skuldi yvir á eysturlandið á snørisveiði, ella teir fóru á sildarveiði við nót, sum var ein vanligur fiskiskapur hjá føroyingum tá.

Heim aftur fóru teir við ymsum ferðamannaskipum sum "Novo" og "Lyru." Farið var vanliga fyrrapartin í juni, og komið varð aftur í september.

Vanliga vóru teir tveir mans á hvørjum báti. Fyrstu tíðina royndu teir við snøri. Men seinni royndu teir við línu, og teir høvdu gørn við at veiða sild til agn. Línan mátti dragast við hond. Men tað var gott at fiska til streym, sum ikki var nógvur á fjørðinum. Tí var ikki var nógv flóð og fjøra. Línuveiðan var fyrst á gamla føroyska háttin við línutroði, tá línan varð rakt á sjógv. Men síðani varð egnt í stamp, og teir gjørdu sær línurennur.

## Nógvir føroyingar á Bakkafirði

Tað vóru ofta nógvir føroyingar á Bakkafirði. Tey fyrstu árini hjá Jógvani Edvard varð fiskurin avreiddur feskur, men kruvdur og avhøvdaður. Fyritøkan, sum keypti, var Jacob Gunnlaugsson, sum hoyrdi heima í Keypmannahavn. Teir høvdu mann fyri seg á Bakkafjørðinum at taka ímóti fiski.



Bakkafjørðurin

Men so fór hendan fyritøkan fallit. Teir máttu tá flekja og salta fiskin sjálvir. Tá var hann okkurt árið førdur heim við Kyrjasteini, var á sildarveiðu og fór kortini heim tómur og vildi hava fiskin til barlast.

Men at salta fiskin sjálvir var nógv strævnari. Fiskurin skuldi berast niðan í høgan bakka, og varð so virkaður í skúri. Men tað var nógvur fiskur at fáa. Tað kundi væl henda, at menn fingu 100 skippund ( 16 tons) fyri bátin. Men Jógvan Edvard kláraði tað eina árið at fáa 100 skippund einsamallur. Hetta var í 1949. Tá kom hann eisini í "Dimmalætting".

## Búðu á posthúsinum

Teir búðu saman við gøtumonnum á loftinum í húsinum, har telefonstøðin og posthúsið vóru í miðhæddini. Í hvussu er seinni búði hreppstjórin, sum var einkjumaður, eisini har við einum soni. Hann tosaði flótandi føroyskt, hóast hann ikki hevði verið í Føroyum.

Tað var annars ikki langt at sigla. Vanliga varð bert veitt á sjálvum fjørðinum, og tað kundi taka 20 minuttir til hálvan tíma at sigla á fiskileið.




*Her síggja vit vitjaða økið norður til Bakkafjørðin*

## Bjargaðir av kíki

Viðhvørt róðu teir til havs. Hetta gjørdu teir tann 2. august 1939, sum eins væl kundi verðið teirra seinasti dagur. Hendan dagin vóru teir við línu. Nógvur fiskur var at fáa, og skjótt var báturin fullur av fiski.

Tað vóru tveir bátar afturat á bankanum. Tað var fitt av vindi av útnyrðingi. Teir vildu lata fisk frá sær sjálvum til